# Fóðursøla, handil og verkstaður



MBM er eitt lutafelag, sum varð stovnað tann 25. oktober 1977 undir navninum Mjólkarvirki Búnaðarmanna. Navnið varð síðan broytt til Meginfelag Búnaðarmanna, stytt MBM

MBM var eina tíð í 4 deildum: tveimum framleiðsludeildum og tveimum innkeyps-, sølu- og tænastudeildum. Í dag koyrir virkið í tveimum deildum, einari framleiðslu- og einari søludeild.

Harafturat kemur leiðsla og marknaðarførsla.

Mjólkarframleiðarar eru lutaeigarar í felagnum men hóast felagið er lutafelag, er tað ríkið sum eitt partafelag. Munurin er helst eigaraviðurskiftini, at bert mjólkarframleiðarar kunnu eiga lut/part í felagnum og tá eftir mjólkarnøgd/kvotu.

Tá flutt varð í nýggja bygningin í 2005, valdu teir at laga felag teirra soleiðis, at teir eftir henda dag høvdu tvær deildir, eina framleiðslu- og eina søludeild.

Framleiðsludeildin er Mjólkarvirkið, sum hevur verið síðani byrjanina við MBM.

Søludeildina, sum umfatar fóðursøluna, handilin og verkstaðið, valdu teir at kalla BÚRØKT.

Í 2005 lá søluinntøkan hjá MBM um 100 mió. kr. Mjólkarvirkið tók í 2005 ímóti 7.459 tonsum av mjólk frá 48 mjólkarframleiðarum.

### Samstarv

Dagliga hevur Búrøkt eitt tætt samstarv við útvegarar sínar, fyri at fáa so nógvan serkunnleika, sum gjørligt. Samstarvið er eisini grundað á, at teir kenna hvønn annan og vita hvørji kor landbúnaðurin í Føroyum hevur: veðurlag, fíggjarligar umstøður, tørvir og ikki minst lendið.

Tað, at teir í dag hjá teimum flestu útvegarunum kunnu bíleggja ein eykalut og fáa hann sendan sama dag, og at teir kunnu tosa við maskinsmiðir útvegarans, um trupulleikar taka seg upp, hevur alstóran týdning fyri teir og harvið eisini fyri viðskiftafólk teirra.

### Ymiskar deildir

Sum nevnt longur uppi á síðuni, hevur MBM havt fleiri ymiskar deildir, ið teir so valdu at leggja saman í bert tvær deildir í 2005, tá teir samstundis fluttu í nýggan bygning.

Ein av deildunum, MBM hevur roynt seg við, er MBM-Kjøt, ið byrjaði sítt virksemi í januar 1997, men Orsakað av harðari kapping við innfluttar vørur, umframt at virkið bert fekk um 50% av føroysku neytunum at fletta, gekk ikki sum ætlað.

Deildin varð tí niðurløgd í januar 2003, og bygningurin seldur.

### Miðið

Miðið hjá MBM Sølu og Tænastu er, saman við viðskiftafólki og útvegarum okkara at hækka støðið á sølu og tænastu á landbúnaðarmaskinum.

*Niels Petersen*
*niels@sosialurin.fo*


**Stórt úrval** **Góð tænasta** www.flisan.fo







**Vitjað okkum á bási nr. 8**

Í sambandi við Byggimessuna hava vit fleiri góð tilboð

Vit hava flísar bæði til innandura og uttandura.

Vit hava landsins største úrval av flísum til bað, køk, gólv, tún og trappur.

Vit veita fegin ráðgeving um val av flísum og álegging.

**Flísan**
Argjaboðagøta 22A
160 Argir
tel 31 80 98
faks 31 64 86
far 51 80 98
flisan@kallnet.fo